# Hvalvíkingar gera garð í báðum endum



Kirkjugarðurin í Hvalvík er vorðin ov trongur og verður nú víðkaður

Mynd: Edvard Joensen

**Hvalvíkar Kommuna hevur bæði barnagarð og kirkugarð í gerð. Og mitt í millum eru eisini fleiri útstykkingar ávegis**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Hvalvík:** Vøggustovu og barnagarð til teirra, sum nýliga eru komin. Kirkjugarð til teirra, sum skulu hiðani frá. Og útstykkingar til teirra, sum ætla at dvølja enn eina tíð í kommununi. Jú, tað er nógv virksemi í Hvalvíkar Kommunu í løtuni.

– Trupulleikin er at halda seg innan fyri íløgukvotuna, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Hvalvíkar Kommunu. Kommunan eigur pengar at arbeiða fyri, men sleppur ikki at gera alt, sum ynskiligt kundi verið í ár, sigur hann. Hálv íløgukvotan í ár verður brúkt til dagstovnin, sum kommunan byggir, meðan restin fer til kirkjugarð og vegagerð í samband við útstykkingar.

Hvalvíkar Kommuna hevur raðfest dagstovnin fremst, og verður hann væntandi liðugur at taka í nýtslu í oktober mánaða, sigur borgarstjórin. Pláss verður fyri 45 børnum, sum verða býtt í eina vøggustovu og ein barnagarð.

Hetta nøktar verandi tørv, sigur Heðin Zachariasen. Sum er eru 34 børn í dagrøkt hjá Hvalvíkar Kommunu. Søkt er eftir starvsfólki til dagstovnin, og fleiri umsóknir eru komnar, greiðir borgarstjórin frá.

Tað er Hvalvíkar Kommuna, sum hevur staðið fyri sjálvari útstykkingini og tí arbeiði, sum har til hoyrir, meðan bygningurin er frá Norðsetri.

– Talan er um ein bygning í tveimum hæddum, har bara tann ovara verður innrættað í fyrsta umfari, sigur Heðin Zachariasen. Tá tørvur verður á tí, kann niðara hæddin eisini verða innrættað og brúkt til dagstovn, sigur hann.

Samlaði kostnaðurin fyri dagstovnin, tá hann letur upp, fer at liggja um tríggjar milliónir krónur.

## Kirkjugarður

Í hinum endanum er brúk fyri kirkjugarði, tí har skulu øll hava eitt pláss at enda.

Tað var vorðið ov tronligt í kirkjugarðinum í Hvalvík, sigur Heðin Zachariasen. Ikki soleiðis, at heilt fult er, men kortini so mikið, at tað var neyðugt at byggja út.

Lagt verður aftur at verandi kirkjugarði í Hvalvík, og verður arbeiðið, sum farið er undir nú, gjørt í tveimum umførum.

Tað fyrsta, sum gjørt er, er at drena og hækka lendið munandi í mun til verandi kirkjugarð. Lágt og váttligt er, har kirkjugarðurin er, og mett varð rætt at hækka lendið, sigur Heðin Zachariasen.

Í hesum umfarinum verður økið hegnað inni, men seinni verður so støða tikin til, um garðurin rundan um skal stoypast ella laðast, sigur hann.

Tilboðið upp á tað sum nú verður gjørt, er upp á eina fjórðings millión. Enn vita tey einki um, hvat sjálvur garðurin fer at kosta, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri.

## Útstykkingar

Men til at fylla bæði barnagarðar og kirkjugarðar skal eisini fólk, sum setir búgv í kommununi. Og tey skulu fáa góðar møguleikar, sigur borgarstjórin.

Ikki færri enn fýra útstykkingar eru ávegis í Hvalvíkar Kommunu. Bæði í Hvalvík og í Streymnesi verða tvær útstykkingar gjørdar.

Í Streymnesi verður arbeitt við 24 grundstykkjum. 12 í ytra, og 12 í innara enda av bygdini.

Tað, sum gjørt verður i ár, er sjálv vegagerðin, sigur borgarstjórin. Her tað tað aftur tann við tíðini kenda íløgukvotan hjá kommunum, sum setir markið.

Næsta ár er so ætlanin at gera liðugt. Tá skal kloakkarbeiðið, ljós og asfaltering gerast.

Eisini í Hvalvík eru útstykkingar í báðum endum á bygdini. Har er talan um tvær ferðir 10 stykkir.

Útstykingarnar í Hvalvík eru framhald av verandi útstykkingum, greiðir Heðin Zachariasen frá. Lendið, har bygt verður, er soleiðis háttað, at eingin trupulleiki er at halda fram haðani, steðgað varð seinast, og tað er tað, nú verður gjørt.

Grundstykkjaprísurin í Hvalvíkar Kommunu liggur um 80.000,- krónur, sigur Heðin Zachariaen, borgarstjóri. Ætanin er at halda hann á leið har ella kanska at fáa hann lækkaðan.

## Kommunu samanlegging ávegis í Norðurstreymoy

**Arbeitt verður við at leggja Hvalvíkar og Saksunar Kommunur saman. Breið semja tykist vera um ætlanina**

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Edvard Joensen*

**Hvalvík:** Arbeitt verður við at leggja Hvalvíkar Kommunu og Saksunar Kommunu saman.

Eingin endalig avgerð er tikin enn, men arbeiðið er komið nakað áleiðis, sigur borgarstjórin í Hvalvíkar Kommunu, Heðin Zachariasen.

Einir tveir fundir hava verið partanna millum, og semja tykist vera um, at úrslitið eigur at verða ein samanlegging, sigur Heðin Zachariasen.

Støða er ikki tikin til, um ein møgulig samanlegging skal til fólkaatkvøðu í kommunum, sigur borgarstjórin í Hvalvíkar Kommunu.

Stigið til samanleggingina kom frá Saksunar Kommunu, sigur Heðin Zachariasen. Væntandi kunnu fleiri fyrimunir vera við eini samanleggin. Fyri báðar kommunurnar, heldur hann.

Kommunurnar báðar eru við í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, sum eisini eitt nú Hósvíkar og Sunda Kommunur eru limir í. Eisini her verður tosað um samanleggingar, men als ikki á tí støði, sum komið er til millum Hvalvík og Saksun, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Hvalvíkar Kommunu.



# Arbeiða trol-og snellufisk í Saltangará

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tvey skip landaðu til Fiskavirking í Saltangará mikudagin.

Kúrberg, sum roynir við snellu, hevði 60.000 pund. Tað nógva var smáttfallandi upsi.

Fram, sum trolar við Vestmenningi, var fullur; teir høvdu út við 200.000 pund, harav góð 140.000 pund var upsi og restin onnur fiskasløg.

Vestmenningur landaði í Vestmanna, og teir høvdu á leið tað sama sum Fram.

Mánadagurin var 2. hvítusunnudagur, og tí er hendan vikan ikki so long. Men Jason Johannesen væntar, at tvey skip aftrat koma inn at landa í vikuni. Tað eru Jaspis og Ametyst, sum væntandi landa fríggjadagin.

– Tað er ikki vist, vit keypa fiskin hjá báðum skipunum, men tað kann hugsast, sigur virkisleiðarin, Jason Johannesen.

Á Fiskavirking í Saltangará eru tey til arbeiðis hvønn dag.



Væntandi koma Jaspis og Ametyst inn at landa fríggjadagin

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Hava fisk út til hurðarar

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Rættiliga nógvur fiskur kom uppá land í Vestmanna fyri hvítusunnuhøgtíðina.

Á virkinum halda tey, at tey keyptu í so nógvan fisk inn, tí mánadagurin var eisini heilidagur.

Í Vestmanna arbeiða tey bara upsa. Hann er smáur, og tað merkir, at tað tekur longri tíð at koyra hann ígjøgnum maskinurnar og pakka hann til lidna vøru.

Men týsdagin keypti Fiskavirking í Vestmanna so eisini lastina hjá Vestmenningi. Teir høvdu sløk 140.000 av upsa og eini 20.000 pund av toski.

– Vit keypa onga last aftrat hesa vikuna, tí nú hava vit fisk út til hurðarar, sum tey taka til í Vestmanna.

Á virkinum arbeiða tey støðugt við tveyskiftivakt, og fólk eru til arbeiðis hvønn dag.

*Vestmenningur landaði 160.000 pund í Vestmanna týsdagin*



# Fanga kombikk á Boðanesi

NÁTTÚRA
*Vilmund Jacobsen*

Hesir báðir fittu smádreingirnir hugnaðu sær óført í fjøruni úti á Boðanesi ein seinnapart herfyri. Teir fangaðu kombikk, og væl kom burtur úr. Teir fingu eitt ótal, sum teir høvdu livandi í eini spann.

Úti á Boðanesi eru fleiri hyljar, har kombikk eru, og er tað nakað, sum børn elska, so er tað at renna runt í eini turrari fjøru, stein av steini, sum hendan dagin.

Ein slík løta er gevandi fyri børnini.

*Ein hugnalig løta hjá tveimum smádreingjum úti á Boðanesi*



Kombikkini, sum eru í fjøruni ymsastaðni, skola uppá land, tá ið brim er, og tá ið veðrið gerst betur, og eingi brot eru uppá land, sleppa tey ikki úr hyljunum aftur.

Annars er kombikk ein løgin fiskur eins og síl og laksur; tey liva bæði í feskvatni og saltvatni, og tað kann tykjast undarligt, tá ið hugsað verður um, hvussu stórur munur er á feskum vatni og søltum sjógvi.

Náttúran goymir nógv loyndarmál, sum vit ikki hugsa um til dagligt. Hon er rík og verd at vitja við børnum.

Annar drongurin var so óheppin hendan dagin, at hann datt í ein hyl og gjørdist buksuvátur! Men tað tók hann ikki so tungt. Veðrið var gott, so tað hevði ongan týdning.

Teir fóru báðir glaðir heimaftur við glúpi og spann fullari av kombikkum.

## Vesturtúgvan landaði í Miðvági

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Eingin landing hevur verið í Miðvági hesa vikuna, men fríggjadagin fyri hvítusunnu landaði Vesturtúgvan. Teir høvdu 100.000 pund av upsa og eitt sløð av øðrum.

Albert Ellefsen sigur, at eingin landing verður í Miðvági hesa vikuna, men virkið hevur keypt fisk frá øðrum virkjum, sum er komin um Vestmannasund í bili.

– Nú verkfallið er av, ber til at arbeiða sum vanligt, og tað lættir nógv um hjá okkum, sum ikki virka inni á meginøkinum, sigur Albert Ellefsen, sum heldur, at tey hesa vikuna hava passaligt av fiski inni.